## Húsvognar til Klaksvíkar

Fyrsti býráðsfundurin hjá Klaksvíkar býráði í ár verður í annaðkvøld. Millum málini er eitt um at nýta útfyllingina í miðstaðarøkinum til húsvognaøki í summar. Fleiri og fleiri kampistar koma til Føroya á hvørjum ári, eins og mong tiltøk verða í Klaksvík í summar, so sum Summarfestivalurin, Sjómannadagurin og Norðoyastevnan, eins og at býurin fyllir 100 ár. Tí mælir Tekniska Umsiting til, at útfyllingin við Sandin verður gjørd til húsvognaøki summarmánaðirnar í ár sum eina roynd.



## Nýggj standmynd í Klaksvík

Í samband við 100 ára haldið hjá Klaksvíkar Kommunu hevur spurningurin verið frammi um at seta upp eina standmynd á økinum við Gamla Kirkjugarð. Á fíggjarætlanini 2008 eru 500.000 krónur játtaðar til endamálið, men seinastu tølini vísa ein væntaðan kostnað uppá umleið 1 mió. kr. Mentanarnevndin mælir til, at standmyndin verður reist, samstundis sum umsitingin kannar hvar møgulig fígging kann útvegast aðrastaðni frá.

# Løgmaður hartar partamann

**- Tað er løgið og óheppið og at Gerhard Lognberg setir krøv fram í fjølmiðlunum, áðrenn samráðingarnar um nýggja samgongu yvirhøvur eru byrjaðar**

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var skeivt av Gerhardi Lognberg, løgtingsmanni, at seta fram eitt ófrávíkiligt krav til eina nýggja samgongu um Sandoyartunnilin.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður og samráðingarleiðari.

Samráðingar um nýggja CHE samgongu byrjaðu í morgun og seinnapartin skuldi eisini fundur verðar við Sjálvstýrisflokkin um at knýta hann upp í samstarvi, antin sum beinleiðis part í samgonguni, ella at fáa hann í valbólk við samgonguna afturfyri at fáa onkrar nevndarsessir.

Men longu tá ið ABC samráðingarnar vóru fyri uppi í Løgtinginum í síðstu viku, staðfesti Gerhard Lognberg, at skuldi hann vera við í eini samgongu, fór hann at seta krøv til, at Sandoyartunnilin verður gjørdur.

Og nú farið verður undir samráðingarnar um eina CHE samgongu, endurtekur hann kravið. Men nú er kravið munandi styrkt, tí í hesi samgonguni eru bara 17 tinglimir, so hon tolir ikki at missa eina tað einastu atkvøðu.

### Løgið og óheppið

Men tað hóvar avgjørt ikki Jóannesi Eidsesgaard, formanni Javnaðarfloksins og samráðingarleiðara, at Gerhard Lognberg hevur sett samgonguni knívin á barkan, longu áðrenn samráðingarnar eru byrjaðar.

- Tað er ikki rætt at seta fram krøv í fjølmiðlum. Rætta mannagongdin er sjálvandi at føra síni sjónarmið fram við samráðingarborðið.

- Útgangsstøðið fyri samráðingunum verður ongantíð betri av, at ófrávíkilg krøv verða sett fram í fjølmiðlunum ístaðin ´fyri á rætta stað og tað er við samráðingarborðið.

Hann væntar kortini ikki, at hetta er eitt skot fyri bógvin í samráðingunum.

Hann sigur, at í hesum málinum er so Gerhard Lognberg tann tiltikni 17. og avgerðandi limurin í samgonguni.

- Men tað eru so nógv mál, sum eru prinsipiell hjá ymsum tinglimum og í onkrum øðrum førum er tað so onkur annar, sum verður 17. tinglimur. Men tað er so í slíkum støðum, at tað politiska handverkið skal standa sína roynd.

Men hann heldur, at vit skulu royna at viðgera hesi málini í sjálvum samráðingunum og ikki í fjølmiðlunum, tí tað er óheppið.

Hann dugir heldur ikki at síggja, at Sandoyartunnilin skal verða ein trupulleiki, tí bæði Tjóðveldið og Javnaðarflokkurin hava týðiliga ført fram, at tunnilin skal fíggjast yvir eitt áramál, so at hann ikki blokerar fyri øðrum, neyðugum útbyggingum.



*Gerhard Lognberg verður hartaður av floksformanni sínum, tí hann er farin at seta krøv, longu áðrenn samráðingarnar um eina nýggja samgongu eru byrjaðar*

Dramatiskt ferðsluóhapp:

# Sluppu ikki úr bussinum í tveir tímar

**Ferðafólk í bussinum hjá Bygdaleiðum úr Havnini vestur í Vágar leygarmorgunin, høvdu eitt dramatiskt upplivilsi, tá ið bussurin fór útav vegnum og vandi var fyri, at hann koppaði**



*Tey 10-12 ferðafólkini, sum vóru í bussinum, tá ið hann gleið útav, máttu brynja seg við toli, tí vandi var fyri, at hann skuldi koppa útyvir tey*

FERÐSLUÓHAPP

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tíðliga leygarmorgunin fekk løgreglan boð um, at ein bussur hjá Bygdaleiðum var farin útav vegnum ímillum Kollafjarðartunnilin og rundkoyringina í Kollfjarðardali.

Bussurin var á veg vestur á flogvøllin við ferðafólki, tá ið hann gleið út av vegnum.

Bussurin helti so nógv at hann stóð og riðaði, so at vandi var fyri at hann skuldi koppa í tí nógva vindinum.

Tí vildu tey ikki lata tey 10-12 ferðafólkini sleppa úr bussinum, tí vandi var fyri, at skaði kundi staðist av, skuldi bussurin koppa útyvir tey.

Boð vórðu send eftir sløkkiliðnum og fólki frá Landsverki og tað eydnaðist teimum at tryggja bussin við endum, so at hann ikki skuldi koppa og tá eydnaðist at fáa ferðafólkini úr honum í øllum góðum.

Tað var eitt arbeiðið, sum tók ímillum ein og tveir tímar og hesa tíðina høvdu ferðafólkini onki val, uttan at verða sitandi í bussinum.

Ferðafólkini fingu so annan fart vestur í Vágar og síðani var roynt at fáa bussin uppaftur, men hann er bæði stórur og tungur, so tað tók sína tíð.

# Meiri til fortreð enn til gagns



*Fyrst var tað eitt oyrað og tvey oyrað. So fór fimmoyrað og tíggjuoyrað og nú syngur eisini fimmogtjúguoyra sín svanason*

**25 oyrað er komið á gravarbakkan og ongin fer at sakna tað**

Tað er ikki so øgiliga langt síðani, at tað fekst ein lítil posi av gummidropsum fyri eitt 25 oyra.

Men tann tíðin er farin og nú er okkara minsta mynt so lítið verd at ongin tímir at hava hana longur.

Í Danmark verður av álvara tosað um at avtaka 25-oyrað og hóast ongin endalig støða er tikin, bendir alt á tað borðið, at okkara minsta mynt skjótt er farin í søguna, skrivar tað nýggjasta Samvirke

Um stutta tíð er tað sostatt bert myntsavnarar, sum hava gleði av at eiga brúnlittu myntina.

Tað 25 oyra, sum vit nú hava, kom fyrst í nítárunum, tá ið hitt gamla 25 oyra við holi í mittuni, fór í søguna.

Men nú er 25 oyrað so lítið at nyttan, sum fæst úr tí, svarar ikki til tað, sum tað kostar at gera.

Tí hevur "Kgl Mønt" spurt handlar og bankar um teir høvdu saknað 25 oyrað, verður tað avtikið, men tað eigur ongan góðan, tí tað er ongin, sum hevði saknað tað.

Tað er danski ráðharrin í búskapar- og vinnumálum, sum hevur endaligu avgerðina um 25 oyrað skal avtakast ella ikki og tann avgerðin er ikki tikin enn.

Bæði í Noregi og í Svøríki er 25 oyrað farið í søguna.

**-aki-**